# At smíða, meðan jarnið er heitt

**- Eg vóni, at Útoyggjafelagnum verður lív lagað, og at tiltakið, sum seinasta ár var í Skúvoy og hesaferð er í Kalsoynni, verður eitt afturvendandi árligt tiltak, segði Signhild Joensen, sum er umboðsráðslimur í Útoyggjafelagnum fyri Trøllanes**

ÚTOYGGJASTEVNAN
*Vilmund Jacobsen*



*Signhild og maðurin, Mikkjal. Hon gongur við posti; hann hevur smiðju og fæst við bóndaskap*
*Mynd: Rúna Sivertsen*

Tað var Signhild Joensen, sum er ættað úr Klaksvík, men gift og búsitandi á Trøllanesi, sum seinasta leygardag bjóðaði vælkomin, áðrenn Útoyggjastevnan í Kalsoynni varð sett av Finnboga Ísaksyni á Trøllanesi hendan dagin.

Signhild er umboðsráðslimur í Útoyggjafelagnum, har hon umboðar Trøllanes.

- Tað er mær ein stórur heiður og ein stór gleði at bjóða tykkum øllum at vera hjartaliga vælkomin higar í dag. Tað er hugnaligt, at tit eru møtt so fjølment til hetta tiltak.

Hon segði, at tá ið Útoyggjafelagið hevði fund í Havn fyrst í mars mánaða í ár, varð samtykt at hava næsta aðalfundin hjá felagnum í Kalsoynni.

- Og so varð at smíðja, meðan jarnið var heitt. Vit avgjørdu at nýta hetta høvi til eisini at reisa á føtur eina bygda/oyggjastevnu, nú høvið beyðst.

### Um viljin er…

Signhild helt fyri, at onkuntíð kann tað vera gott at taka eina avgerð, áðrenn tú kennir avleiðingarnar av henni.

- Tí, høvdu vit vitað, at hetta tiltak fór at gerast so stórsligið, høvdu vit helst hugsað okkum um meira enn einaferð. Men líkamikið. Eru vit fá, so ber tað kortini eisini til - bert viljin er til staðar.

Unga húsmóðirin, sum saman við manni sínum, Mikkjali, eigur 5 børn, segði seg vóna, at dagurin í Kalsoynni fór at gerast minnisríkur, har vinir og kenningar hittast, og fólk fara knýta nýggj vinarbond.

- Eg vóni, at hesin dagurin fer at eydnast væl fyri okkum øll - og ikki minst fyri okkara gestir, ið hava leitað sær í Kalsoynna í dag.

At enda segði Signhild Joensen seg vóna, at Útoyggjafelagnum verður lív lagað og at tiltakið, sum seinasta ár var í Skúvoy og hesaferð er í Kalsoynni, verður eitt afturvendandi árligt tiltak.



*Mangur sat væl og fekk gott at eta í snotuliga heiminum hjá Signhild og Mikkjali á Trøllanesi seinasta leygardag*
*Mynd: Rúna Sivertsen*

# Góður rækjufiskiskapur, men lágir prísir

**Síðsta hósdag kom rækjutrolarin, Napoleon, aftur av túri við 442 tonsum av rækjum. - Tað gongur tungt hjá rækjuflotanum, men er fiskiskapurin góður, hongur tað kanska saman hjá nøkrum av skipunum, sigur Tórbjørn Jacobsen**

RÆKJUFLOTIN
Vilmund Jacobsen



*- Tað er ikki rationell veiða, tá ið rækjuskipini noyðast at vera farmaskip hjá sær sjálvum, nú kanadiskar havnir eru stongdar fyri føroyskum fiskiskipum, sigur Tórbjørn Jacobsen.*
*Mynd: Edvard Joensen*

Hósdagin í síðstu viku kom rækjutrolarin, Napoleon, aftur av túri. Teir hava roynt á Flemmish Kap. Skipið hevur fiskað í seks vikur, og veiðan vá 442 tons.

120 tons av veiðini er rárækjur, sum Rækjuvirkið á Oyri keypir. Restin er kókaðar rækjur, sum verða seldar til ymiskar marknaðir.

Miðalprísurin fyri alla lastina er út við 12 kr. fyri kg. Tær smæstu rárækjurnar kosta heilt niður í 5-6 kr. fyri kg.

Napoleon fór úr Føroyum fyri júst tveimum mánaðum síðan, men við tað, at 5 dagar eru at sigla hvønn vegin, veiðan skal leggjast upp, og pakningur fáast umborð, hevur skipið brúkt tveir mánaðir um hendan túrin.

### Farmaskip hjá sær sjálvum…

Tórbjørn Jacobsen sigur, at fiskiskapurin hjá Napoleon hevur verið hampiliga góður hendan túrin, men rækjuprísurin er lágur, og eingi serlig útlit eru til, at prísirnir fara at batna.

- Nógvar rækjur koma á marknaðin úr Asiu, og somuleiðis fiska eitt nú kanadiumenn og grønlendingar nógvar rækjur, sum trýsta marknaðin.

Tórbjørn ásannar, at tað gongur tungt hjá rækjuflotanum, men er fiskiskapurin góður, hongur tað kanska saman hjá nøkrum skipum.

- Nú havnirnar í Kanada eru stongdar fyri føroyskum fiskiskipum, og vit tískil noyðast at sigla heim við hvørjari last, merkir hetta, at vit missa ein túr um árið. Hetta svarar til eitt tap uppá einar 5-7 milj. krónur.

Hann sigur, at tað er ikki rationell veiða, tá ið rækjuskipini noyðast at vera farmaskip hjá sær sjálvum, sum hann tekur til.

- Vit vóna tí, at ein loysn fæst á kreppuni millum Føroyar og Kanada, nú fundur er í Halifax um hetta mál.

Tórbjørn Jacobsen heldur, at sleppa rækjuskipini aftur at leggja veiðina upp og skifta fólk í Kanada, kann hetta vera tað íkast fyri nøkur av skipunum, sum annars vantar í dag.

### Avstað aftur

Mánakvøldið fór Napoleon aftur til fiskiskap, og enn einaferð ber leiðin yvir á Flemmish Kap.

Skipið hevur bíðað eftir pakningi úr Danmark, sum var tarnaður av verkfallinum.

17 mans eru við Napoleon, og skipari hendan túrin er Petur Sigurd Petersen av Skála.

Skipari seinasta túr var ein annar skálamaður, Pauli Justinussen.



HEIMARØKTIN & SERFORSORGIN

## Søkt verður eftir økisterapeutum til Heimarøktina

Almannamálaráðið hevur avgjørt at seta á stovn eina økisterapi í øllum landinum. Í hesum sambandi er ætlanin at seta terapeutar í teimum 6 heimarøktarøkjunum, ið skulu veita tænastu til fólk við tørvi á uppvenjing og viðlíkahaldi av førleika. Tænastan verður veitt til vaksin yvir 18 ár, ið búgva heima ella í eldrasambýlum kring landið.

Økisterapi er eitt nýtt tilboð, ið skal skipast og mennast í tøttum samstarvi við økisleiðslurnar, aðrar samstarvsfelagar og starvsfólkabólkar, ið hava týdning fyri hin einstaka brúkaran.

**Í mun til tann einstaka brúkaran skal økisterapeuturin:**
- Meta um førleika og tørv á tiltøkum
- Veita ADL- og funktiónsvenjing
- Veita vegleiðing til starvsfólk og avvarðandi í at vera um brúkaran
- Veita ergonomiska vegleiðing, undirvísing og ráðgeving til starvsfólk og avvarðandi
- Gera uppfylgjandi arbeiði í samband við útskrivan frá sjúkrahúsi
- Viðvirka við meting, útvegan og nýtslu av hjálpartólum, húsabroytingum v.m.

**Vit sóknast eftir ergo- og/ella fysioterapeutum sum skal**
- Hava arbeiðsroyndir
- Evna at arbeiða sjálvstøðugt
- Duga væl at samskifta við brúkarar og avvarðandi
- Hava hug og hegni at arbeiða tvørfakligt og at samstarva við aðrar stovnar

**Vit bjóða:**
- Eitt nýtt starv við møguleika fyri at skipa og menna starvsinnihaldið
- Eitt mennandi umhvørvi við møguleika fyri førleikamenning

**Setanar- og lønarviðurskifti:**
Talan er um størv við setanarstað í Heimarøktini og við ábyrgd mótvegis økisleiðaranum. Arbeiðsøkið verður í einum av hesum 6 heimarøktarøkjunum: Suðuroy, Sandoy, Suðurstreymoy, Vágar/Norðstreymur/Norðeysturoy, Eysturoy og Norðoyggjar.

Økisterapeutur verður løntur sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag við einaískoyti.

Viðmerkjast skal hvat/hvørji øki umsóknin fevnir um.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Heimarøktina á telefon 30 40 20.

Umsókn við neyðugum prógvum/viðmælum skal sendast til:

Heimarøktin og Serforsorgin
Eirargarður 2
Postsmoga 139
110 Tórshavn

**Umsóknarfreistin er 2. juli 2003, kl. 12.00**

